


*Henda bókin og hennara medhøvundur írin Séamas Ó Síocháin er ein av okkara høvuðskeldum til hesa røð. Perman vísir innføddar savna gummi, sum var fremsta grundarlagið fyri ræðuleikunum í Congo*

Í 6. og 7. parti verður greitt frá hansara virksemi í Føroyum, grundað á hansara frasagnir til Echoes of Service. Tað er nakað nógv skrivað um hetta í bókini "Men Gud gav Vøkst" hjá Sigurd Berghamar, so tað verður minst møgulig endurtøka.

Men hetta tilfar er partvíst ein góð samtíðarlýsing av lívinum í Føroyum um hetta mundi, eins og tað er ein góð lýsing av andaliga lívinum um ta tíðina, tá ið Brøðrasamkoman fær fótin fyri seg. Hetta kann saktans eisini hava almennan áhuga.

Um tað verður meira valdast, hvat tilfar kemur undan kavi.

## Kæran, sum vísti seg at vera følsk

Ein spurningur, sum verður viðgjørdur í tí, sum er skrivað um Congo, er eisini tann viðferð, sum trúboðarar kunnu hava givið teimum innføddu. Tað kann ikki undra um tað hava verið spenningar, tí tað var jú stórur munur millum hugburðin hjá teimum innføddu og teimum hvítu, eisini fyri tað um teir vóru trúboðarar. Tað var eisini vanliga fatanin, at tey innføddu ikki fingust at arbeiða uttan við eini harðari hond.

Tí hevði Balolo missiónin eisini gjørt sína leiðbeining "Pinciples and Practice" um, hvussu farast skuldi við teimum innføddu. Her var likamlig revsing bannað. Hóast hetta vóru hendingar nú og tá, sum vóru í stríð við hesa reglugerð.

Her stóð Dollin rættiliga fyri skotum, tá kært varð um hann til høvuðsstýrið fyri Balolo Congo Mission "Home Council", sum hevði sæti í London.

Vita fara at lýsa hetta mál fyrst og fremst út frá fundarbókini hjá Congo Balolo Mission. Eina serliga viðgerð fær bókin hjá svenskaranum David Lagergren "Mission and State in the Congo", sum er ein útgreining av viðurskiftunum millum protestantiskar trúboðarar og myndugleikarnar í Congo árini 1885-1903.

Hetta stýri hevði fundir nakrar ferðir árliga, og tá ið vit koma til 1903 er talið á fundum komið uppá 100 fundir. Teir verða hildnir í Harley House, sum er missiónsskúlin, har Dollin var, áðrenn hann fór til Congo, og eisini har hann búði, tá ið hann var í London aftaná heimkomuna. Annars búði hann eisini í Glasgow.

Formaður í stýrinum var Harry Grattan Guiness (1861-1915). Pápi hansara við sama navni, stovnaði fyrst Livingston Inland Mission og síðan Congo Balolo Mission.

Guinnes var upprunaliga ivasamur um frásagnirnar um yvirgangin í Congo. Í royndunum at víðka virksemið hjá missiónini hevði hann nógv samband við myndugleikarnar í Belgiu. Í hesum sambandi vísti hann ofta á, hvussu væl missiónin og myndugleikarnir samstarvaðu í økinum.

Men seinni broytti hann kós og fór fult út í part við tey, sum bardust ímóti hesum vanstýri, og er hann tískil farin í part við Dollan. Sagt verður eisini, at Guiness setti Dollan sera høgt.

Hvør fundur byrjar við bøn og við, at fundarbókin fyri undanfarna fundin verður lisin og góðkend. Øll mál fáa eina hampiliga stóra umrøðu í fundarbókini, og tí fæst ein góð mynd av, hvat ið hevur gingið fyri seg.

Tað er ikki vist, at vit hava fingið alt við. Men vit hava tikið við teir fundir, sum Séamas Ó Síocháin hevur víst til, tá ið vit áður hava havt samband við hann. Hann er annar av teimum, sum hevur skrivað bókina "The Eyes of Another Race", sum er ein frágreiðing um ferðina hjá Casement, og sum er høvuðskeldan til hesa frásøgn.

## Fundarbókin

Tann fyrsti fundurin um hetta mál var 27/11/02.

Fyrst skal endurgevast tað, sum stendur í fundarbókini:

"Eitt langt og álvarsamt orðaskifti varð í samband við eina frágreiðing hjá Mr. Sawyers, sum beint var afturkomin úr Afrika, nú hann hevði lagt frá sær í missiónini.

Vísandi til sína støðu klagaði hann um, at økisnevndin í Congo ikki hevði givið honum møguleika at framføra síni sjónarmið fyri henni. Nevnin samtykti at gera kanningar av hesum viðurskiftum saman við Mr. Ruskin og Mr. Harbet. (Teir vóru til staðar á fundinum og mæltu frá, at Sawyers skuldi verða sendur aftur til Congo.) Síðan kom Sawyers við einum hópi av útsøgnum til nevndina, og aftast í fundarfrásøgnini er ein samandráttur av hesum. Sawyers framførdi álvarsom óreglulig viðurskifti, sum hann pástóð fóru fram, serliga á dampskipunum og missiónsstøðini Bonginda (har Dollin virkaði).

Guinnes nevndi nakrar útsagnir, sum Mr. Sawyers hevði sagt honun í samband við Hr. Ellary, trúboðari. Hetta var millum annað viðvíkjandi eini ógrundaðari ákæru um morðroynd á Mr de Grey frá Waka. Umframt tað, at Mr. Harris - eftir at hava havt at einum handilsmanni fyri at hava nýtt pískin - hevði sent eitt brævtil sama handilsmann og biðið hann heldur nýta pískin móti einum av egnu arbeiðarunum hjá Mr. Harris.

Sum eitt úrslit av hesum varð einmælt samtykt, at allir trúboðarar sum vóru heima í farloyvi, skuldu hittast við nevndina hósdag eftir til eina ráðstevnu fyri at fáa allan sannleikan fram í hesum máli.

Álvarsligar bønir vóru bidnar viðvíkjandi niðurstøðuni av hesum fundi.



*Henry Grattan Guinnes var ein høvuðsmaður í Balolomissiónini. Sagt verður, at hann virdi Dollan høgt*

## Samandráttur av kæruni:

Mr. Sawyers sigur í ein frágreiðing frá, hvat hann hevur sæð í fimm vikur, tá hann var í Bonginda saman við Mr. Clark á síni ferð oman eftir Congoánni. Hann fór úr Baringa 8. august, og hann var í Bonginda tær tvær seinastu vikurnar í august og allan september.

Alla hesa tíðina nýtti Danielson pískin "the chicotto", og umborð á dampbátinum var tað dagligur kostur, at menn vóru húðflongdir hvønn morgun, um teir ikki høvdu fingið til vega ta ásettu nøgdina av brenniviði til maskinuna. Menninir vóru lagdur á jørðina og fingu hvør 25 sløg. (Vanliga revsingin hjá gummifyritøkunum var 50 sløg, okkara viðmerking).

Pískurin hevði fýra álir av húð av áarrossi flættaðar saman.

Danielson koyrdi eisini menn og kvinnur í varðhald, tá ið teirra menn ella vinir ikki komu við nóg mikið av viði. Mr. Sawyers segði, at hann sá meira enn eina ferð menn og kvinnur í varðhaldi, meðan hann var í Bonginda. Hetta var einasta stað, har hann hevði sæð hesa framferð.

Mr. Sawyers varð spurdur, um hann var varugur við nakran



*Hetta er damparin "Henry Reed", sum Dollin var maskinmeistarti og skipari á hendan søguliga túrin saman við Roger Casement*